

# RUNAVÍKING

**VODAFONEDEILDIN** Sigursrøðin hjá runavíkingum heldur fram, eftir at teir vunnu oddadystin móti HB við Løkin leygarkvøldið. Stóri spælarin hjá NSÍ varð Christian Høgni Jacobsen, sum skoraði bæði málini í 2-0 sigrinum

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| NSÍ | 2 |
| HB | 0 |

AB kláraði ikki at basa runavíkingum, eiheldur EB/Streymur, B68, B36,B71, ÍF, FC Suðuroy ella Víkingur, og leygarkvøldið noyddist HB eisini lúta fyri sigursvandu runavíkingunum. Sostatt hevur NSÍ vunnið á øllum Vodafoneliðunum, og kundu við sigrinum á HB leggja seg einsamalt á odda í fremstu mansdeildini í fótbólti.

Felagsnevnarin fyri góðu gongdina hjá runavíkingum er sambart venjaranum hjá runavíkingum, Paula Poulsen, fyrst og fremst dygdargott liðavrikið, og so sjálvandi eisini ein Christian Høgni Jacobsen í serflokki

– Sjálvandi fær Christian Høgni nógva umtalu, hann skoraði jú bæði málini hjá okkum, og var eygsýndur í dystinum móti HB, men Christian Høgni ger tað ikki einsamallur. Heldur er talan um eitt sera gott liðavrik, sum legði grundarstøðið undir sigrinum á HB, og sigursrøðini vit eru í, segði Pauli Poulsen eftir dystin.



## HOL Á

*Christian Høgni Jacobsen setur hol á, við at senda brotssparkið framvið Marcin Dawid í HB málinum.*

*Mynd: Sofus Johannesen*

## Tað er altíð gott at vinna á hinum liðunum, sum liggja í oddinum

– Tað er altíð gott at vinna á hinum liðinum, sum liggja í oddinum, tí tað gevur jú sjálvsálit og trúgv uppá at vit gera tað rætta. Men samstundis er tað umráðandi hjá okkum at sláa kalt vatn í blóðið, og halda fast í dygdunum, sum hava givið okkum hesar níggju sigrarnar, sigur ein jarðbundin Pauli Poulsen.

Meðan frøin er stór í Runavík, so iðra teir seg í HB. Eitt er tað at HB tapir 2-0 í Runavík, men Fróði Benjaminsen iðrar seg serliga um brotsparkið sum broytti alt, tí HB hevði tamarhald á støðuni eftir steðgin.

HB liðskiparin hevur grein í sínum máli, tí HB komu væl betri við í dystin eftir steðgin, samstundis sum boddurin á NSÍ trýstinum var avtakandi. Tískil var tað sum at fáa váta vøttin í høvdið hjá havnarmonnum, tá Hans á Lag gjørdi eitt býtt brotspark, 10 minuttir fyri dystarlok, sum Christian Høgni setti trygt í netið. Í síðsta minutti staðfesti toppskjúttin í Vodafonedeildini sigurin, tá hann var sterkari í einum nærdysti við verjuspælara, og smekkaði bóltin í kassan til 2-0.

Sjálvt um brotsparkið var við at seta runavíkingar í gongd, so var sigurin hjá runavíkingum uppiborin. Teir vóru grammari og vildu meira, eins og teir komu fram til fleiri vandastøður, meðan HB ikki var nøkur hóttan móti NSÍ málinum.

### NSÍ væl betri fyri steðgin

Runavíkingar vóru spælstýrandi í fyrra hálvleiki, ikki minst takkað verið væl spælandi Jústinus og Jann Inga á sentrala miðvøllinum. Leikliga yvirvágin hjá runavíkingum sást aftur í kjansum, har Klæmint, Christian Høgni og Heðin høvdu hvør sína nasku roynd móti málinum hjá gestunum, meðan gestirnir ikki høvdu tað stóra at bjóða í álopsspælinum fyri steðgin.

Beint fyri steðgin var Klæmin A. Olsen sera nær við at leggja NSÍ á odda, tá hann eftir hornaspark sútaði bóltin móti málinum, men